# Voxpop á G!

Lagt til rættis: Eirikur í Jákupsstovu



## Jákup Wardum

**Hví ert tú á G!?**
*Eg havi spælt sjónleik til eitt barnatiltak. Og so fari eg at vera her í kvøld, tá tað stóra ballið verður.*
*Hvat er tað besta við G!?*
*Eg havi ikki verið á tjaldingarøkinum. Men tað plagar at vera øgiliga gott. Hinvegin er tónleikurin eisini góður, men tað besta er ballið frammanfyri pallin.*
**Hvat er tað ringasta?**
*Tað kann verða, at sólin skínur so bjart, og so kemur kaldur vindu brádliga.*
**Hevur tú skorað á G!?**
*Nei. Eg havi verið her í tveir tímar, og so havi eg eisini damu. So tað ber ikki ordiliga til.*



## Berglind Hafsteinsdóttir

**Hví ert tú á G!?**
*Tí eg havi fingið eina billett. Og so kann eg vera saman við fólki. Drekka og hugna mær.*
**Hvat er tað besta við G!?**
*Tjaldingarøkið.*
**Hvat er tað ringasta?**
*Musikkurin í ár.*
**Hevur tú skorað á G!?**
*Nei, eg havi sjeik.*

## Dánial Hoydal

**Hví ert tú á G!?**
*Tað er næstan ein traditión og so er stemmingurin eisini so góður. Harumframt er tónleikurin nakað, sum mær dámar.*
**Hvat er tað besta við G!?**
*Tað er stemminingurin og so møtti eg eisini unnustuni á G!.*
**Hvat er tað ringasta?**
*Havi ikki so nógv ringt at siga, men kanska eru vaktirnir at sindur smáligir við hvørt.*
**Hevur tú skorað á G!?**
*Ja, fyri tveimum árum síðan.*





## Leivur Holm Joensen

**Hví ert tú á G!?**
*Tí eg var her í 2007 og tá var tað so forbii festligt. Tað er mest fyri tjaldøkið. Vit eru 10 mans, sum hugna okkum saman, so tað er super.*
**Hvat er tað besta við G!?**
*Tjaldingarøkið. Uttan iva. Tað er tað besta. Og so er tað eisini gott, at sólin skínur.*
**Hvat er tað ringasta?**
*Eg veit ikki um tað er nakað ringt. Tað einasta er, um tað fer at regna ella okkurt.*
**Hevur tú skorað á G!?**
*Hmm... Ja. Jú. Tann fyrsta dagin. Havi havt onkrar djúpar samrøður við onkrar damur, og so havi eg sungið fyri teimum eisini. Eg eri eisini blivin forelskaður tvær ferðir. Hart at vera á G!*



## Sóley Thomsen

**Hví ert tú á G!?**
*Lurta eftir tónleiki og vera saman við vinum.*
**Hvat er tað besta við G!?**
*Tjaldingarplássið og øll tey naknu fólkini, tá tað er gott veður.*
**Hvat er tað ringasta?**
*Tá tað regnar, og mann ikki kann fara inn, og tað er kalt.*
**Hevur tú skorað á G!?**
*Nei. Ikki enn, men í kvøld verður tað.*

## Carina Jacobsen

**Hví ert tú á G!?**
*Tí tað rular. Mega kul.*
**Hvat er tað besta við G!?**
*Tjaldingarøkið.*
**Hvat er tað ringasta?**
*Ehm. Hósdagin, tá tað regnaði. Onki ringt um G!*
**Hevur tú skorað á G!?**
*Nei, eg geri ikki sovorið. Eg eri komin at hava tað stuttligt.*

